**Leiðbeining til lærarar**

# Føroyskt

**1.-3. floksstig**

**1. august 2023**

Krøvini til lærugreinina føroyskt eru ásett í námsætlanini í føroyskum 1-A og í støðisnámsætlanini. Í hesi leiðbeiningini eru frágreiðingar um nøkur av hesum settu krøvum. Sitat úr galdandi námsætlanum eru markað við skákskrift.

## Tilhoyrandi skjøl

- Námsætlan – føroyskt 1-A
- Støðisnámsætlan
- Leistur – eftirmeting og afturboðan

## Tímatal

Undirvísingin á 1. og 2. floksstigi fevnir vanliga um ellivu undirvísingartímar um vikuna bæði árini.

Undirvísingin á 3. floksstigi fevnir vanliga um níggju undirvísingartímar um vikuna í eitt ár.

# Innihaldsyvirlit

1. Kjarnaøki ....... 3
1.1. Talaða málið ....... 3
1.2. Skrivaða málið ....... 3
1.3. Málkunnleiki ....... 4
2. Førleikar ....... 4
2.1. Faklig førleikamál – 3. floksstig ....... 4
2.2. Støðisførleikar ....... 8
2.2.1. Lesing ....... 8
2.2.2. Skriving ....... 9
2.2.3 Munnligt samskifti ....... 10
2.2.4 Kt- førleikar og talgildisbúgving ....... 10
3. Eftirmeting og afturboðan ....... 10

# 1. Kjarnaøki

*Lærugreinin føroyskt hevur trý ymisk kjarnaøki, ið eru tey somu frá lægsta til hægsta stig. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.*

- *Talaða málið*
- *Skrivaða málið*
- *Málkunnleiki*

*Føroyskt 1-A*

## 1.1. Talaða málið

*Kjarnaøkið talaða málið snýr seg um at tosa, at lurta, at skilja og at rannsaka talaða føroyska málið. At samskifta væl og skiljandi og at lurta eru avgerandi sosialir og mentanarligir førleikar. Støðan, samskift verður í, skapar karm um samskiftisháttin. Undirvísingin skal tí fevna um ymisk munnlig tekstsløg og margháttað tekstsløg, sum hvørt á sín hátt skulu styrkja fatanina av ymsum munnligum samskiftisháttum og av leiklutum teirra samskiftandi.*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir skulu læra at nýta málið virkið og alsamt víðka um orðfeingið. Tey skulu í munnligum samskifti, práti og samrøðu duga at skifta ímillum at tosa og at lurta. Somuleiðis fevnir kjarnaøkið um at siga frá egnum søgum og upplivingum, at læra at spyrja og at svara greitt og at halda munnligar framløgur av ymsum slag.

## 1.2. Skrivaða málið

*Kjarnaøkið skrivaða málið snýr seg um at lesa og skriva føroyskt. At lesa og skriva eru javnskipaðar læritilgongdir, har næmingurin mennir skriviførleikan við at lesa og lesiførleikan við at skriva. Hugur næminganna at lesa og skriva skal stimbrast og somuleiðis tilvitan teirra um lesi- og skrivitilgongdina. Undirvísingin skal fevna um eitt fjølbroytt úrval av ymiskum fagur- og yrkisbókmentaligum tekstsløgum, herímillum eisini margháttaðum tekstsløgum.*

*Føroyskt 1-A*

Skrivitilgongdin stuðlar undir lesifatanina, samstundis sum næmingarnir læra og venja at skipa tankar og hugskot. Tí hevur tað týdning á hesum stigi, at skriving er sameindur partur av lesitilgongdini. Tekstúrvalið eigur at vera fjølbroytt og viðkomandi fyri næmingarnar, soleiðis at tey kenna aftur viðurskifti í tekstunum og ogna sær kunnleika úr tí lisna. Somuleiðis er tað týdningarmikið, at undirvísingin leggur dent á, at næmingarnir fáa møguleika at nýta hugflog og skapanarevni til at gera sínar egnu tekstir.

## 1.3. Málkunnleiki

*Kjarnaøkið málkunnleiki fevnir um føroyska málløru og málsøgu. Næmingarnir fáa innlit í málið sum skipan og tilknýti tess til mentan og samleika. Undirvísingin skal fevna um málløru á støðugt hækkandi torleikastigi, føroyska málsøgu og norðurlendska málfelagsskapin.*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir skulu stigvíst menna málsliga tilvitið um bygnaðin í málinum. Undirvísingin eigur at fevna um so mikið av málløru, at grundarlagið undir stavseting, høvuðsorðaflokkum og setningbygnaði verður lagt.

# 2. Førleikar

## 2.1. Faklig førleikamál – 3. floksstig

Fakligu førleikamálini í grunddeild er leiðbeinandi ávegismál og orðað sum væntanir fyri fakligu úrtøkuna, sum stinnastu næmingarnir hava ognað sær eftir 3. floksstig. Eins og kjarnaøkini umskarast ymsu fakligu førleikamálini, og í flestu førum verður arbeitt við fleiri førleikamálum samstundis.

- *at lurta, tá ið talað verður, og taka orðið eftir tørni í samrøðu*
- *at lurta eftir søgum og frásagnum*

*Føroyskt 1-A*

At duga at lurta er fortreyt fyri at kunna ogna sær mál og hugtøk, tí tað er við at hoyra talað mál, at málið verður ment og orðfeingið áhaldandi økt. Serliga í byrjanarundirvísingini er tað týdningarmikið, at næmingarnir menna síni evni at lurta, eisini tá aðrir floksfelagar bera okkurt fram. At lesa søgur og at siga frá er umráðandi, tí tá mennast hugsavningar- og ímyndanarevnini hjá næmingunum. Tí er tað týdningarmikið, at lærarar raðfesta at lesa fyri næmingunum. Eisini í lurtitilgongdini verða evnini at grunda um og at meta um innihaldið í søgu og frásagnum stimbrað, og tað er týdningarmikið at hoyra orð og setningar í ymiskum høpi. Alt hetta hevur alstóran týdning fyri mál- og lesimenning.

- *at tosa um innihald og snið í lættari tekstum, herímillum hvussu orð og mynd virka saman í myndabókum*

*Føroyskt 1-A*

Tá tosað og prátað verður um innihald í søgu og tekstum, venja næmingarnir at nýta málið virkið og at seta orð á og draga inn egnar upplivingar og meiningar og soleiðis byggja nýggja vitan á kenda vitan. Í undirvísingini verður arbeitt við ymsum tekstsløgum, so næmingarnir fáa kunnleika um bæði fagurbókmentaligar og yrkisbókmentaligar tekstir.

Næmingarnir skulu læra at tosa um og viðgera myndir sum tekst og samspælið millum mynd og tekst. Serliga í grunddeildini eru myndir útgangsstøði fyri samrøðu og práti. Eitt nú kann tosað verða um, um samsvar er millum myndina og skrivaða tekstin, og um myndin sigur nakað annað ella meira enn teksturin ella umvent.

- *at vísa kunnleika um rím, rytmu og ramsur og arbeiða við ljóðum og ljóðlesing*

*Føroyskt 1-A*

Rím, rytmur og ramsur er við til at økja tilvitið um málbygnað, herímillum orðmyndan, framburð og tónalag. Næmingarnir skulu fáa høvi at royna seg við at gera síni egnu rím og ramsur og soleiðis uppliva møguleikar og fjølbroytni, sum eru í talaða málinum. Undirvísingin eigur at skipast soleiðis, at næmingarnir sleppa at brúka hugflogið og sansirnar og royna seg við rytmu, rími og ramsu. Hetta stuðlar undir lesingina og gevur næmingum eitt ljóðligt ansni.

At arbeiða við ljóðum er týðandi liður í fyrstu tilgongdini at læra at lesa. Næmingarnir skulu læra sambandið millum ljóð og bókstav og at seta ljóð saman til orð. Ljóðlesingin stuðlar næmingunum í at hoyra og at skilja sambandið millum grafiska teknið og ljóðið.

- *at orða seg og nýta málið sum amboð í samrøðu, samstarvi og framløgu*

*Føroyskt 1-A*

At orða seg og nýta málið sum amboð snýr seg um at lurta, at siga frá og at samskifta eftir samskiftisstøðu og móttakara. Í samskiftinum við onnur ogna næmingarnir sær sosialar førleikar og menna sín persónliga og mentanarliga samleika, herímillum at nýta málið í vanligum samskifti og í tvístøðum. Í samrøðuni læra tey at grunda um innihald, at seta spurningar, at lurta eftir og at taka støðu til tað, ið hin/hini bera fram.

Eisini er týdningarmikið, at næmingarnir longu í grunddeild læra at fyrireika og halda einfaldar framløgur fyri flokkinum og foreldrum. Við framløgum kunnu tey læra at laga innihaldið til høvið og málbólkin, sum framløgan er ætlað. Framløgurnar skulu tó altíð taka støði í fortreytunum hjá næmingunum.

- *at syngja og vísa kunnleika um sangir og sálmar*

*Føroyskt 1-A*

Sangur og at syngja er partur av undirvísingini í føroyskum. Sangur stimbrar og stuðlar málmenningina hjá næmingunum, styrkir verbala málið, umframt at orðfeingið verður víðkað. Tá sungið verður, eru tað tey skapandi evnini, sum verða nýtt, og næmingarnir uppliva at brúka málið á virknan og skipaðan hátt í fjøltáttaðum høpi.

Sangir og sálmar er partar av okkara mentan og siðaarvi, og tí er tað týdningarmikið, at næmingarnir í undirvísingini í føroyskum ogna sær kunnleika um sangir og sálmar og uppliva felagsskapin í at syngja saman.

- *at lesa upp og innantanna við at brúka einfaldar avkodingar- og fatanarsnildir*

*Føroyskt 1-A*

Tað hevur stóran týdning fyri lesimenningina, at næmingarnir lesa upp. Tá næmingarnir hoyra seg sjálvar lesa og t.d. steðga á við torfør ella nýggj orð, er hetta er gott amboð at stuðla teimum í lesimenningini, soleiðis at tey, sum frálíður, lesa raðið. Tað er týdningarmikið, at undirvísingin í 1., 2. og 3. flokki verður skipað soleiðis, at næmingarnir fáa høvi at lesa hart dagliga. Umráðandi er, at næmingarnir eru væl á veg í lesimenningini, áðrenn byrjað verður at lesa innantanna. Fortreytin fyri at fáa nakað burtur úr innantannalesingini er, at næmingarnir eru stinnir í avkodning og lesifatan, t.e. duga væl at knýta nýggja vitan og undanvitan saman.

Tá talan er um snildir, snýr tað seg um at leggja eina miðvísa ætlan til tess at náa einum ávísum máli. Tí hevur tað týdning, at næmingarnir øll skúlaárini fáa nágreiniliga (eksplisitta) undirvísing í lesisnildum, bæði avkodingarsnildum og fatanarsnildum. Næmingarnir skulu læra, nær og hvussu ymsu snildirnar skulu brúkast, soleiðis at tey, sum frálíður, duga at brúka tær smidliga og lætt. Tá talan er um avkoding, at býta orð sundur og at lesa rím og rímpartar, og tá talan er um fatanarsnildir, kann tað t.d. vera at visualisera tekstin, at lesa setningar ella brot umaftur og at seta spurningar til tekstin.

- *at lesa við hóskandi lesiferð og endurgeva tað lisna*

*Føroyskt 1-A*

At lesa við hóskandi lesiferð merkir, at lesingin av orðum er automatiserað, og at næmingarnir duga at lesa upp og innantanna uttan at brúka orku til avkoding. Lesiførleikin er nøktandi, tá ið tey lesa aldurssvarandi tekst rætt upp og við hóskandi lesiferð. Næmingarnir skulu læra og venja at fyrihalda seg til ymiskar tekstir og við støði í egnum upplivingum av tekstunum ogna sær kunnleika og vitan úr tí lisna. Endurgevingin gevur næmingunum møguleika at knýta nýggju vitanina saman við vitan, tey hava frammanundan.

- *at lesa ymisk tekstsløg, ið hóska til førleikastøðið*

*Føroyskt 1-A*

Tað er týdningarmikið, at næmingarnir frá byrjan uppliva, at tey megna at lesa, og at tað gevur meining at duga at lesa. Tey skulu lesa ymiskar viðkomandi tekstir, herímillum yrkistekstir, sum stuðla teimum í lesimenningini og stimbra hugin at lesa. Tað hevur stóran týdning, at næmingarnir áhaldandi uppliva at megna at lesa og skilja innihaldið í tekstum, og tí er umráðandi, at næmingarnir hava møguleika at lesa ymiskar tekstir á hóskandi torleikastigi.

- *at vísa, at tað lisna er skilt, eitt nú við at tekna, skriva ella leggja fram*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir skulu verða eggjaðir til at brúka hugflog og skapanarevni, og eigur hetta at vera natúrligur liður í undirvísingini í føroyskum. Undirvísingin eigur at skipast soleiðis, at næmingarnir á fjølbroyttan hátt vísa, hvat tey hava fingið burtur úr tekstunum. Tí skulu næmingarnir fáa høvi at greiða frá og leggja fram, bæði einsæris og í bólki, bæði skrivliga og munnliga. Í hesum sambandi læra og venja tey at nýta málið, samstundis sum tey mennast málsliga, fakliga og persónliga. Tey eiga eisini at fáa møguleika at tekna ella mála sínar upplivingar av tekstum. Á henda hátt læra tey at sjónliggera (visualisera) tað, tey hava fingið burturúr.

- *at vísa kunnleika um skaldskap av mannamunni, herímillum viðkomandi sagnir, ævintýr og kvæði*

*Føroyskt 1-A*

Munnliga frásøgnin, at siga frá sagnum, ævintýrum og hendingum, er saman við kvæðunum partur av føroyska mentanararvinum. Tí er tað viðkomandi, at næmingarnir í grunddeild fáa kunnleika um, hvussu søga og skaldskapur gjøgnum fleiri ættarlið eru varðveitt. Munnliga frásøgnin og upplestur eru viðkomandi háttaløg, tá arbeitt verður við skaldskapi av mannamunni. Tað er umráðandi, at næmingarnir læra um føroyskar sagnir, fyrst og fremst tær úr nærumhvørvinum, og ævintýr. Sum

tekstslag hóska hesi væl til yngru næmingarnar. Søgugongdin er einføld, nógvar endurtøkur, tvístøður millum gott og ónt, umframt at endin er góður. Frásagnir og upplestur stuðla undir málmenningina og stimbra samveruna í flokkinum. Undirvísingin fevnir eisini um kvøðing og at fara upp á gólv at læra stev og at kvøða lættari vísur. At fara upp á gólv fevnir eisini um felagsreglur, skipan, rørslu og rytmu og mennir felagsskapin í flokkinum.

- *at velja og læna bøkur á bókasavni og lesa eftir førleika og av áhuga*

*Føroyskt 1-A*

Skúlabókasavnið eigur at vera natúrligur partur av undirvísingini í føroyskum, soleiðis at næmingarnir læra at brúka teir møguleikar, sum bókasasavnið hevur. Tað er sera týdningarmikið, at næmingarnir varðveita hugin at lesa. Næmingarnir eiga at verða eggjaðir til at lesa, bæði í skúla og heima, og soleiðis ogna sær góðar lesivanar. Tí er tað umráðandi, at lærarin regluliga fer á bókasavnið við næmingunum og lærir tey at finna bøkur eftir áhuga og førleika.

- *at skriva orð og setningar við hond, nýta stórar og smáar bókstavir rætt og seta punktum*

*Føroyskt 1-A*

At læra at skriva við hond og ogna sær eina góða og týðiliga hondskift er partur av undirvísingini í føroyskum. Byrjast kann við at skriva smáar og stórar bókstavir, læra skrivileiðina, skrivistøðuna o.a. Sum frálíður, skulu næmingarnir megna at orða setningar og ymiskar frásagnir í skrivligum formi og soleiðis festa egnar tankar og hugsanir á blað. Tað er týdningarmikið, at skrivligi parturin í undirvísingin í grunddeildini verður framdur soleiðis, at næmingarnir skriva í hond og á papír, soleiðis at taktilu og mortorisku sansirnir eru virknir og verða stimbraðir.

Fyri at ogna sær nøktandi skriviførleika og nærlagni í skrivingini, so hondskriftin verður automatiserað, er týdningarmikið, at næmingarnir skriva regluliga og miðvíst, helst hvønn dag. Undirvísingin skal eisini fevna um at læra næmingarnar at skipa og skapa skrivligar tekstir og seta teir greitt upp. Skrivingin stuðlar undir lesingina og munnliga samskifti í flokkinum, og tí skal undirvísingin eisini fevna um, at næmingar fáa møguleika at ogna sær viðkomandi skrivisnildir, sum t.d. at fáa hugskot, hugsavna seg um evni og læra at stava vanligastu orðini rætt. Í 2. og 3 flokki verður byrjað við at læra næmingar setningsbygnað og at skipa setningar við at seta punktum.

Í grunddeildini er talgilt undirvísingartilfar natúrligur partur av undirvísingini, og tí skulu næmingarnir stigvíst læra at nýta knappaborð og 10-fingraskipanina.

- *at skriva upplivingar og stuttar søgur í tíðarrøð og við fjølbroyttum orðalagi*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga við støði í egnum hugsanum, hugflogi, kenslum, upplivingum og kunnleika at læra at skriva og skapa egin avrik í ymiskum tekstsløgum. Tey skulu læra at skriva søgur og skipa tær í tíðarrøð. Dentur skal leggjast á, at næmingarnir ogna sær eitt ríkt og fjøltáttað orðfeingi. Ein týðandi liður í hesum er at leggja áherðslu á at gera sær ómak og soleiðis stigvíst ogna sær gott arbeiðslag.

- *at stava tey vanligastu orðini rætt*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga stigvíst at menna sín skriviførleika og læra at stava vanligastu orðini rætt. Í byrjanini læra tey at skriva orð, setningar og smáar søgur, soleiðis sum tey hoyra orðini (ljóðskriva), og so við og við gerast tey stinnari í at stava rætt. Á 3. flokstigi verður ikki væntað, at næmingarnir skriva lýtaleyst, men at tey eru før fyri at stava fonetiskt og megna at skriva tey vanligastu orðini rætt.

- *at skapa tekstir við at seta saman orð, ljóð og myndir*

*Føroyskt 1-A*

Undirvísingin skal tryggja, at næmingarnir læra at brúka ljóð og myndir í sambandi við at skapa tekstir og at siga frá hendingum og støðum í nærumhvørvinum. Tey kunnu eitt nú fara út í náttúruna at taka myndir og taka ljóð upp. Við hesum kunnu tey læra at skapa egnar tekstir, umframt at tey fáa kunnleika um margháttaðar tekstir.

- *at nýta orðalistar og finna orð í orðabókum*

*Føroyskt 1-A*

Orðalistar er eitt naturligt amboð í sambandi við skrivimenningina, og tí er tað týdningarmikið, at næmingarnir læra at nýta orðalistar. Hetta skal mennast miðvíst, tí tað gevur næmingunum møguleika at ogna sær sjálvstøðugt arbeiðslag og gott hegni. Harumframt er týdningarmikið, at næmingarnir læra orð og venja bókstavaraðið.

- *at vísa kunnleika um høvuðsorðaflokkarnar, herímillum navnorð, sagnorð og lýsingarorð*
- *at vísa kunnleika um einføld mállæruhugtøk, herímillum eintal, fleirtal, nútíð og tátíð*

*Føroyskt 1-A*

Í byrjanarundirvísingini snýr mállæra seg um at tosa við næmingar um góðan málburð. Næmingarnir skulu læra at seta navnorð í eintal og fleirtal og kenna mun á kynunum. Tey skulu læra at seta sagnorð í navnhátt, nútíð og tátíð. Harumframt snýr mállæran seg um at læra næmingarnar at kenna lýsingarorð aftur.

## 2.2. Støðisførleikar

### 2.2.1. Lesing

*At lesa er ein fjøltáttað fatanarlig og málslig tilgongd, sum krevur, at lesararnir avkoda og síðan tulka tekstin við støði í vitanini, sum tey hava frammanundan.*

*Næmingarnir skulu læra at avkoda, skilja og tulka tekst í øllum sínum ymisleika. Góð lesiundirvísing hevur til endamáls at menna og stimbra lesføri næminganna í ymsum tekstsløgum í øllum lærugreinum. Víðkaða teksthugtakið fevnir, umframt um orð, tekn og bókstavir, eisini um aðrar tekstlutir, sum næmingarnir skulu læra at týða, so sum myndir, livandi myndir og ljóð.*

*Støðisnámsætlan*

Tað er í grundeildini, at næmingarnir skulu læra at lesa, og tað er í fyrstu skúlaárunum, at støðið undir lesimenningini hjá næmingunum verður lagt. Lesing er ein støðisførleiki, tí ein stórur partur av samskiftinum, sum fyrr var munnligt og persónligt, í dag fer fram í skrivligum formi á t.d. talgildum

miðlum. Tí er góður lesiførleiki ein fortreyt fyri at kunna klára seg væl í skúlanum, í samfelagnum og í arbeiðslívinum. Samstundis er sera týdningarmikið at hava fyri eyga, at næmingarnir, meðan tey læra at lesa, uppliva lesigleði og varðveita forvitni og hugin at lesa. Undirvísingin eigur tí at skipast soleiðis, at næmingarnir fáa góðar lesiupplivingar, at tey mennast og uppliva at eydnast og at gera framstig. Móðurmálslærugreinin hevur serliga støðu og ábyrgd í at læra næmingarnar at lesa, tí lesiførleikin er fortreyt fyri, at næmingarnir ogna sær kunnleika í hinum lærugreinunum. Fyri at gerast ein stinnur lesari er neyðugt at lesa nógv og miðvíst. Næmingarnir skulu lesa í skúlanum, men tað er eisini umráðandi, at tey lesa heima. Foreldrini hava tí eisini ein týðandi leiklut í lesimenningini hjá børnum, og eiga at stuðla børnunum í lesingini heima.

Børnini hava ymiskar fortreytir og eru tí ikki øll komin líka langt í lesimenningini, tá tey byrja í skúlanum. Málslig fatan og orðfeingi eru fortreyt fyri at kunna lesa og skilja tað, sum lisið verður. Ásannandi henda ymisleika er tað skúlans uppgáva at tillaga og skipa undirvísingina soleiðis, at allir næmingarnir læra at lesa og áhaldandi menna lesførið.

## 2.2.2. Skriving

*Førleikin at skriva snýr seg um at greiða frá og samskifta skrivliga. Dentur verður lagdur á at seta orð á hugsanir, evni og kenslur, umframt at menna hugskot og viðgera ymisk viðurskifti skrivliga í øllum lærugreinum. Førleikarnir at lesa og skriva eru sínámillum treytaðir, og fortreytin fyri at skriva ein tekst er, at næmingarnir hava neyðuga orðfeingið og skilja orð og hugtøk og seta hesi í rætt høpi. Skrivitilgongdin stuðlar undir fatanina og at skipa tankar og hugskot.*

*Støðisnámsætlan*

Skrivingin er í stóran mun samantvinnað við lesitilgongdina, og tað er eisini í grunddeild, at næmingarnir skulu læra at skriva og málbera seg í skrivligum formi. Undirvísingin eigur at fevna um at læra og venja at skriva bókstavir, orð og setningar, soleiðis at skrivihegni næminganna áhaldandi verður ment og automatiserað. Málið er eisini, at næmingarnir ogna sær eina hondskrift, sum er skjót at skriva og løtt at lesa. Fortreytir næminganna eru somuleiðis ymiskar í sambandi við at skriva. Her verður t.d. hugsað um, hvussu hildið verður um blýantin, skrivileiðina frá vinstu til høgru, og hvussu best er at sita. Nakrir næmingarnar hava tørv á stuðlandi leiðbeining í sambandi við skrivingina fyri at sleppa undan, at tey ogna sær óheppið arbeiðslag og óhepna sitistøðu.

Næmingarnir eiga at læra at orða seg skrivliga á móðurmálinum, at skriva stutt boð, at seta orð á egnar hugsanir og kenslur, umframt at siga frá hendingum. So líðandi sum næmingarnir mennast í skrivingini, verður væntað meira av skrivingini viðvíkjandi torleika og innsatsi. Næmingarnir skulu læra at skipa og skriva einfaldar tekstir. Tað stuðlar eisini skrivingina, at skrivaði teksturin verður lisin upp, tað gevur næmingunum møguleika at uppliva og fáa fatan av muninum millum talaða og skrivaða málið, og at hesi hava ymiskar reglur.

### 2.2.3 Munnligt samskifti

*Munnligt samskifti snýr seg um at tosa, bera fram, skifta orð um, samrøða, grundgeva og lurta. Munnliga samskiftið skal stimbrast og mennast í øllum lærugreinum. Munnligt samskifti skapar samband við onnur og er týðandi liður í at menna persónligar, mentanarligar og sosialar førleikar.*

*Støðisnámsætlan*

Munnliga samskifti í 1. -3. flokki snýr seg um, at næmingarnir læra at siga frá egnum upplivingum og hugsanum, at seta spurningar, at gera viðmerkingar til hvønn annan og at luttaka í samskiftinum í flokkinum. Í byrjanarundirvísingini kann tað verða avbjóðandi at skipa munnliga samskiftið í flokkinum soleiðis, at allir næmingarnir eru virknir í prátinum, umframt at tað eru trupult at fáa tey at lurta eftir hvørjum øðrum og at vera hugbundin. Men munnligt samskifti er eisini ein tilgongd, sum næmingarnir skulu læra í samskiftinum við hinar floksfelagarnar og við leiðbeining og stuðli frá lærarunum. Tí er týdningarmikið, at munnligi parturin verður væl skipaður, og at næmingarnir læra at bera seg at innan henda arbeiðshátt, at lurta eftir hvørjum øðrum, at bíða eftir tørni og at tosa skilligt. Tað er týdningarmikið, at allir næmingarnir sleppa til orðanna og verða eggjaðir til at taka lut og geva sítt íkast til samrøðuna, tí tað er við at seta orð á, lurta, grundað og grundgeva, at tey mennast málsliga, persónliga og sosialt.

### 2.2.4 Kt- førleikar og talgildisbúgving

*Kt-førleikar og talgildisbúgving snúgva seg bæði um førleikar at brúka ítøkilig, viðkomandi kt-amboð og at skilja amboðini, og í hvørjum samanhangi tey skynsamt kunnu nýtast. Eisini snúgva kt-førleikar og talgildisbúgving seg um atferð á talgildum miðlum og keldukritiska viðgerð av talgildum tilfari. Endamálið er at búgva næmingarnar til at vera virknar, sjálvstøðugar, kritiskar og fólkaræðisligar borgarar í einum talgildum samfelag.*

*Støðisnámsætlan*

Í grunddeildini skulu næmingarnir eisini so smátt byrja at arbeiða við kt-amboðum og talgildisbúgving. Viðkomandi er at tosa um samskifti og atburð á talgildum pallum og á sosialum miðlum, og um samtykkisreglur í sambandi við myndir og filmsbrot. Næmingarnir eiga eisini at fáa innlit í at leita eftir viðkomandi upplýsingum á netinum, t.d. at brúka talgilda bókasavnsskipan, netbornar orðabøkur og at finna viðkomandi upplýsingar á heimasíðu skúlans. Í sambandi við skriving eiga næmingarnir eisini at byrja so smátt við at læra at brúka knappaborð.

# 3. Eftirmeting og afturboðan

*Aðalmálið við allari undirvísing í øllum skúlaverkinum er, at allir næmingar áhaldandi læra og mennast, og tí eru reglulig eftirmeting og afturboðan um úrtøku og menning næminganna sameindur partur av allari undirvísing í øllum lærugreinum og á øllum stigum í skúlaverkinum.*

*Í hesum sambandi er tað týdningarmikið, at skúlaverkið strembar eftir at skapa eitt trygt og mennandi undirvísingarumhvørvi, har undirvísingin er fjøltáttað og væl skipað við dygdargóðum fakligum*

*innihaldi og háttaløgum. Harumframt er tað týdningarmikið, at undirvísingin hevur ítøkilig mál, so næmingarnir vita, hvat uppgávurnar fevna um, og hvat væntað verður av teimum.*

*Eftirmeting av úrtøkuni gevur bara meining, um hon verður fylgd upp av ítøkiligari afturboðan, sum tekur saman um núverandi støðu, heildarúrtøku og menning næminganna. Lærararnir skulu tí hava innlit í úrtøku, arbeiðslag og ídni hjá næmingunum í læritilgongdini.*

*Afturboðanin til næmingarnar skal leggja dent á næsta stig í tilgongdini og undirvísingina frameftir. Fyri næmingarnar snýr tað seg um, hvussu tey kunnu menna úrtøku og hegni, umframt hvussu tey kunnu tillaga ella møguliga bøta um arbeiðslag og avrik. Fyri lærararnar snýr afturboðan seg um at tillaga undirvísingina við støði í vitan um næmingaúrtøku, undirvísingargongdir, háttaløg o.a.*

*Eftirmetingin skal saman við afturboðan leggja áherðslu á læri- og menningartilgongdina heldur enn á sjálvt úrslitið. Endamálið er at eggja og stuðla næmingunum í áhaldandi at vilja læra og menna fakligu, persónligu og sosialu fortreytirnar.*

*Støðisnámsætlan*

Til at stuðla áhaldandi menning, virknari luttøku og fakligari úrtøku skulu næmingarnir javnan fáa afturboðan og leiðbeining í sínum arbeiði.

Regluliga eftirmetingin er sameindur partur av undirvísingini og er, saman við ítøkiligari afturboðan til næmingarnar, kjarnin í eini dygdargóðari eftirmetingarskipan. Eftirmetingin skal tryggja lærarum innlit og vitan í fakligu úrtøkuna og heildarmenningina hjá einstaka næminginum og flokkinum og vera didaktiska grundarlagið undir møguligum tillagingum. Eftirmetingin skal somuleiðis vera grundarlag undir regluligu afturboðanini til næmingarnar og foreldrini.

Skilagott er at eftirmeta saman við næmingunum, bæði einsæris og í flokkinum. Týdningarmikið er, at tey kenna seg trygg og hoyrd og fáa høvi at umrøða ymisk ivamál ella avbjóðingar, sum tey hava í læritilgongdini ella í samstarvinum í flokkinum ella við lærarar. Upplagt er eisini javnan at vísa næmingunum á fakligu førleikamálini og støðisførleikarnar, so tey vita, hvat væntað verður av teimum.

Afturboðanin til næmingarnar skal leggja áherðslu á næsta stig í tilgongdini og stuðla næmingunum í undirvísingini og fjølbroyttu menningini frameftir. Tað er eisini týdningarmikið, at næmingarnir fáa leiðbeining um tað, sum er viðkomandi fyri skúlagongdina frameftir, bæði viðvíkjandi arbeiðslagi og luttøku í undirvísingini og viðurskiftunum við aðrar næmingar.

Afturboðanin eigur at vera jalig, skilt á tann hátt, at dentur í afturboðanini verður lagdur á læri- og menningartilgongdina, so tey varðveita hugin og treysti at læra og taka virknan lut í undirvísingini. Afturboðanin kann vera munnlig ella skrivlig. Víst verður til leiðbeinandi skjalið ”Leistur – eftirmeting og afturboðan”, sum lærarar kunnu styðja seg til.